VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 26. mai 2026
J.nr. 26/12185

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Tórshavn

**Svar frá Jacob Vestergaard, landsstýrismanni, upp á skrivligan fyrispurning nr. SS-003/2025 frá Fíu Selmu Nielsen, løgtingskvinnu, um, nær dagførdur vinnupolitikkur verður orðaður at leggja fyri Løgtingið til aðalorðaskifti.**

*Fyrispurningurin er soljóðandi:*

1. *Nær fer landsstýrismaðurin at dagføra vinnupolitikkin frá 2005?*
2. *Hvørjar tillagingar/dagføringar ætlar landsstýrismaðurin at skjóta upp í dagførda vinnupolitikkinum?*
3. *Ætlar landsstýrismaðurin at leggja dagførda vinnupolitikkin til aðalorðaskifti í Løgtinginum?*
4. *Nær væntar landsstýrismaðurin, at nýggi vinnupolitikkurin verður staðfestur?*

*Svarað verður undir einum:*
Støðið undir føroyska vinnupolitikkinum varð lagt í 1999, tá ið grundleggjandi fortreytirnar fyri einum nútímans vinnupolitikki í einum fríum marknaðarbúskapi vórðu lýstar og greinaðar.

Í 2005 varð politikkurin lagaður til avbjóðingar og møguleikar í alheimsgerðini.

Í hesum árum verður heimurin aftur meira polariseraður. Tað merkir m.a., at vit, eins og onnur lond, mugu økja sjálvbjargni og tryggja okkum, um eitt nú flutningsmøguleikar verða avmarkaðir. Hetta broytir tó ikki tann veruleika, at Føroyar hava ein tann mest opna búskapin í heiminum, og at tað hevur alstóran týdning, at vit hava góð handilssambond við útheimin og støðugt virka fyri betri atgongd til verandi og nýggjar marknaðir.

Í vinnupolitikkinum frá 2005 verður staðfest, at yvirskipaða stevnumiðið í politikkinum er at hækka livistøðið hjá einstaka borgaranum í Føroyum og at útbyggja vælferðarsamfelagið.

Fyri at røkka hesum máli verður dentur lagdur á at at lata føroyska samfelagið upp fyri umheiminum og at skipa vælvirkandi marknaðir. Aftur at hesum skulu førleikar og karmar hjá virkjum og arbeiðsmegi mennast við miðvísum tiltøkum til tess at taka kappingina upp á altjóða marknaðum.

Dentur er harumframt lagdur á gransking og vitanarspjaðing, íverksetan og marknaðarføring og týdningin av at hava ein vælvirkandi marknaðarbúskap.

GONGIN 7 • FO-100 TÓRSHAVN •
TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

Yvirskipaða stevnumiðið er ikki broytt seinastu 20 árini, og vinnupolitikkurin frá 2005 er tí enn sum áður aktuellur. Innan fyri teir karmar, sum vinnupolitikkurin frá 2005 skipar, er vinnupolitikkurin støðugt dagførdur við í verki at fremja tær broytingar, sum skiftandi løgting og landsstýri hava sett út í kortið seinastu 20 árini.

Vinnugreinapolitikkir, -strategiir og -heildarætlanir eru gjørd og síðani dagførd á ymsum økjum, m.a. innan maritimar vinnur, landbúnað, ferðavinnu, skapandi vinnur, kunningartøkni o.a. Sum dømi kunnu nevnast Vakstrarforum og Visjón 2015 eins og tað rúgvumikla tilfarið, sum Vinnumálaráðið hesi árini hevur framleitt.

Grundleggjandi vinnulóggávan, m.a. innan fíggjargeiran (bankar) og eftirlit við hesum, fjarskiftis- og samskiftismál (íroknað post-, telegraf- og telefonmál) og nettrygd, handilsmál, tryggingarmál og vinnufelagalóggávu (íroknað vinnufeløg, t.e. parta- og smápartafeløg, kommandittfeløg, interessentfeløg o.tíl.), ársroknskaparlóg, bókhalds- og grannskoðaralóggáva, hvítvasklóggáva og vinnurekandi grunnar, eru støðugt dagførd, so føroyskar fyritøkur ótarnaðar kunnu útflyta vørur og tænastur til útlendskar marknaðir.

Tilfeingislóggávan, sum fevnir um m.a. aling, landbúnað og ráevni í undirgrundini, er broytt og dagførd, eins og lóggávan, sum tryggjar okkara sjófólk, t.e. serliga viðvíkjandi trygd á sjónum og manningarviðurskifti, lýkur allar altjóða treytir.

So hvørt umheimur og fortreytir skifta og broytast, verða føroyska vinnulóggávan og umstøðurnar kring vinnuna annars lagaðar til soleiðis, at forðingar fyri framleidni og búskaparligari menning verða tiknar burtur.

Føroysk vinna er fjøltáttað, og føroysk vinna hevur í verki víst, at hon er før fyri skjótt at laga seg til broyttar fortreytir. Fremsta uppgáva okkara – løgtingsins og landsstýrisins – er tí at tryggja, at føroyski vinupolitikkurin støðugt er soleiðis háttaður, at føroyskt vinnulív hevur bestu fortreytir at virka.

Samanumtikið er vinnupolitikkurin eins aktuellur í dag sum hann var í 2005, hóast umstøðurnar í heiminum tíðum broytast.

Politikkur og lóggáva seinastu 20 árini vísa eisini, at vit hava fylgt og fylgja við skiftandi umstøðum og broyta tað, sum skal broytast. Farið verður tí ikki undir at orða nýggjan vinnupolitikk í næstum; heldur verður dentur ta komandi tíðina lagdur á at fremja ítøkilig átøk á vinnuøkinum, sum samgongan hevur sett sær fyri.

Vinnumálaráðið, 26. mai 2026

**Jacob Vestergaard**
landstýrismaður